HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Heimablídni

Heimablídni er ein skipan, har tað eftir avtalu, ber til at vitja fólk í heiminum og fáa mat og drekka.

Virksemið krevur ikki løggilding frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tí talan er um veitan av mati í privata húsarhaldinum[1]. Heimablídni er ikki undir eftirliti av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Hvat er heimablídni:

- Tit búgva á staðnum
- Veitanin av mati er úr køki, tit sjálvi nýta dagliga
- Tit gera og borðreiða matin sjálvi
- Húsfólk eru vertir
- Virksemi er einans eftir avtalu

Hvat er ikki heimablídni:

- Kafe ella matstova og verður marknaðarført sum kafe við matarskrá
- Høli, sum eru innrættað til kafe- ella matstovu endamál
- Høli, t.d. úthús, fjós, neyst (sum ikki er heimið)
- Fastar upp- og afturlatingartíðir
- Er opið fyri almenninginum uttan avtalu frammanundan

Ert tú í iva um heimablídni, ring til okkara á Tel. (+298) 55 64 00 ella send ein teldupost til hfs@hfs.fo

---

***Ofta settir spurningar til heimablídni***

*1) Ferðalið fer ein dagstúr til útoyggj. Frammanundan ringja tey til bónda á oynni, og avtala at hon skal gera teimum eina máltíð. Er hetta í lagi? Svar:* - Ja

*2) Tað er lítið útboð til ferðafólk her eg búgvi. Eg havi tí sett eitt skelti upp um, at til bera at keypa ein drekkamunn við pannukøku ella líknandi, um eg havi tíð. Tey kunnu ringja ella banka uppá. Er hetta í lagi? Svar:* -Ja.

*3) Vit búgva ein part av árinum í húsum á smáplássi. Vit kundu hugsað okkum at hava heimablídni. Er hetta í lagi? Svar:* -Ja, og um treytirnar annars eru í lagi sambært heimablídni.

*4) Vit eiga tvey hús, men hugsa at hava heimablídni í tí húsinum, sum vit vanliga leiga út. Er tað í lagi? Svar:* - Nei, tí heimablídni kann einans fara fram, har tit búgva. Í staðin kunnu tit søkja um løggilding.

*5) Vit kundu hugað okkum at hava kafe inni hjá okkum, og at hava opið 2-3 tímar um dagin. Úrvalið verður avmarkað, men vit gera alt sjálvi. Kaféin skal eita Kafe Heimablídni. Er tað í lagi? Svar:* -Nei. Heimablídni er ikki kafevirksemi, tvs. virksemi skal ikki hava fastar upplatingartíðir, og kann ikki marknaðarførast sum kafe

---

[1] Kunngerð nr. 128 frá 28. desember 2010 um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum (løggildingarkunngerð)